

Haldið Sosialin

... tí góð bløð hanga ikki á trøunum

TÝSDAG
MIKUDAG
HÓSDAG
FRÍGGJADAG
LEYGARDAG

Sosialurin er lættur at tryggja sær.

Tekna eitt hald fyri einans **400,– KR. UM ÁRSFJÓRÐINGIN**
og spar 380,- kr. ella 47% í mun til at keypa hann í leysasølu.
(600 kr. um ársfjórðingin í Danmark - ella 500,- kr. fyri 5 bløð 1 ferð um vikuna)

Um tú frammanundan er haldari, kanst tú harafturat halda
Internet-Sosialin fyri einans 120,- kr. um ársfjórðingin.

Ja!

Eg tekni meg sum haldara av Sosialinum og gleði meg til at fáa blaðið 5 ferðir um vikuna fyri 400,- kr. um ársfjórðingin.

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið
**64**

Navn:

Bústaður:

Postnr./Bygd/Býur:

Telefonnummar:

Undirskrift:

**Sosialurin**
Postsmoga 76
110 Tórshavn

SISERO 351800






*Heimbygdin er ikki longur natúrliga miðan í heiminum hjá modernaða føroyinginum*

*Mynd: Kim Simonsen*

# Í Sandoynni móti vári

## Hugleiðing um føroyskar oyggjar og kjak um modernitet

Vit koyrdu eftir vegnum til Dals á Sandoynni. Har er høgt omanav. Vegurin er smalur, sjálvandi møttu vit bussum og øðrum stórum bilum. Komin til Dals, var veðrið so toluligt, heldur dimm skýggj á himmalinum. Tað er vetur enn í Føroyum. Dagurin er tó longdur, menniskju og tjøldur leingjast eftir várinum og ljósinum

ESSAY

*Kim Simonsen*

Í Húsavík stóð ein flokkur av tjøldrum á sandinum, samankropin í hvassa vindinum. Tey tyktust leingjast eftir sólini, hitanum og bíðaðu eftir framtíðini. Ferðamøddir flytifuglar, júst komnir heim til Føroyar at vitja eitt bil. Tey standa eisini soleiðis, tá summarið er um at vera av. Tá fellur langferðaálvari á fuglarnar, og teir standa so melankolskir á nesjum og tangum og kúra. Teir fyrireika seg til langa og vandamikla ferð, so langt suður sum til Afrika. Afturkomnir á klettarnar skulu teir eisini venja seg við at vera her. Júst sum vit menniskju, her í bygdini hjá Húsfrunni.

Eg havi ikki verið á Sandoynni í eini 15 ár. Har er vakurt. Nógv vøtn eru á Sandoynni. Komin eftir vegnum frá Skopun kemur Norðara Hálsavatn og Heimara Hálsavatn. Síðani kemur stóra Sandsvatn. Ávegis til Skálavíkar kunnu vit síggja móti Lítlavatni og Stóravatni. Útsýnið er vakurt av Sandslíð móti Skúvoy, Stóru Dímun, Lítla Dímun og handan mjørkan hómast Suðuroyggin.

Tað er gott samband millum Sandoynna og Meginlandið, men enn eru bygdir sum Dalur, Húsavík, Skarvanes og Skálavík langt burturi, men frá hvørjum? Í dag er tað sum um ein ósjónlig ond reikar um heimin av miðsavnan, sosialari broyting — modernitetur kalla tey tað, men hetta hevur eisini ringar avleiðingar við sær í støðum.

Støð hava fingið eina aðra merking í dag. Heimbygdin er ikki longur natúrliga miðan í heiminum hjá modernaða føroyinginum. Fyrr vóru samfeløg sjálvsnøktandi. Búði man eitt nú í Dali, var ikki so neyðugt at reika runt landið. At koma eitt nú úr Dali, Húsavík ella Skálavík segði nógv um persónin. Hetta kunnu vit vit lesa hjá Heðini Brú. Bygdamentanin og eindarmentanin í bóndasamfelaginum var sterk, ramlig og livandi. Í øldir hava fólk livað av jørðini og av at fiska. Bygdin og samanhaldið vóru karmur um ein harðan arbeiðsfelagsskap. Rundan um henda karm kom so trúgvin og kirkjan. Seinni í tíðini kom tjóðaskaparrørslan eisini til. Trúarrørslur, fráhaldsrørslur og ungmannafeløg kappast kanska serliga um tey ungu — men bygdin stóð so ramlig, stolt og livandi sum ein mentalur topo-